

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 05 - 2013

# Stór altjóða oljufeløg vísa Danmark áhuga

Hóast danskir myndugleikar herfyri løgdu upp til at broyta skattaskipanina fyri oljufeløg, sum hava leitiloyvi í danska partinum av Norðsjónum, og hetta fekk týska oljufelagið Winterhall at hótta við at gevast at gera íløgur har, so tykjast mong oljufeløg nú kortini vísa danska landgrunninum ans. Umleið 31 oljufeløg tóku av innbjóðing at hoyra um framtíðar møguleikarnar á landgrunninum, skrivar Berlingske. Undir seinastu útbjóðingini í 2005 var áhugin munandi minni enn nú. Sjeynda útbjóðingin verður í heyst. Stóri áhugin hevur samband við nýggjastu kanningarnar av undirgrundini, sum benda á, at har er nógv meira til av olju og gassi enn higartil hildið. Men tað eru knýttar stórar tøkniligar og fíggjarligar avbjóðingar at hesum. Seinastu mongu árini eru gjørd seks fund á danska landgrunninum.